gult20 cyan20 magenta20 svart20

Mentunarkvøld 1. juni 2001

10.00-22.00	Barnabókasavnið: Bókamerkjakapping. Teknikapping fyri børn upp til 13 ár.
10.00-22.00	Býarbókasavnið: Opið er á útlánínum, lesistovuni og barnabókasavninum.Framsýning: Nýggjar føroyskar bøkur
10.00-22.00	Fornminnissavnið: Framsýningin í Brekkutúni er opin
10.00-22.00	Náttúrugripasavnið: Framsýningin er opin
10.00-22.00	Norðurlandahúsið er opið
10.00-23.00	Fornminnissavnið: Útisavnið heima á Garði er opið
11.00-23.00	Listasavnið er opið. Grafiski verkstaðurin er opin frá kl. 17.00.
15.00-17.00	Sjónleikarhúsið: Andlitsmáling til børn, eisini verður søla av andlitsmáling
15:00	Barnagarðurin á Argjum syngur á Torginum í SMS
15:00	Fornminnissavnið: Flota 3 stórar bátar í Hoyvík og sigla/rógva oman til Havnar og ganga niðan á Vaglið til setanina kl. 16.00. Aftan á verður róð niðan aftur til Hoyvíkar
16:00	Víkingatelt verða í gongugøtuni
16:00	Bojsensgarður er opin
16:00	Vaglið: Jassarnir spæla. Gunnar Hoydal setur Mentanarkvøldið. Barnakór hjá Musikkskúlanum syngur og Havnar Hornorkestur spælir.
17:00	Barnasjónleikur í Sjónleikarhúsinum
17:00	Fjotti og Bobo - undirhald fyri børn í SMS
17:00	Fornminnissavnið: Rundvísing verður í framsýningini í Brekkutúni
17:00	Útisavnið í Hoyvík: Heimavirkisfelagið virkar heima á Garði, og jarnsmiður smíðar í smiðjuni
17:30	Jassarnir spæla í Dr.Jakobsensgøtu
18:00	Mótasýning í Dr. Jakobsens gøtu: Benetton, Kiss, Vogue, 28, Mótaskálin og Skálabúðin
18:00	Rundvísing í Listaskálanum
18.00-23.00	Smiðjan í Lítluvík er opin.
18:00	Útisavnið í Hoyvík: Rundvísing heima á Garði
18.30-21.30	Barnadiskotek verður í Margarinfabrikkini
19:00	Grafiski verkstaðurin í Listaskálanum er opin til kl. 23.00
19:00	Gríma: Eyðun Johannesen og Johan Norðfoss siga frá gomlu Havnini. Video: Undirhúsið á útferð.
19:00	Kammarkórið syngur í Bojsensgarð.
19:00	Rundvísing verður í framsýningini í Brekkutúni
19:00	Spákingartúrur á Reyni og Tinganesi við ferðaleiðara. Byrjað verður í túninum á Tinganesi. Vitjað verður í Havnar kirkju
19:00	SSB-skótarnir skipa fyri siðing á Kongabrúnni.
19:30	Dinnertónleikur í SMS
19:30	Norðurlandahúsið: Martin Næs sigur frá framsýningini Ein er søgan úr Íslandi komin, ið endar leygardagin.
20:00	All That Rain "unplugged" í SMS
20:00	Mótasýning í Vágsbotni: Kallkyn, Stásið, Fandango. Jassarnir spæla
20:00	Rundvísing verður á Útisavninum og í Hoyvíksgarði
20:30	Konsert í Listaskálanum við Jóhannes Andreasen og Sámall Petersen
21:00	Kim Hansen Trio spælir í SMS
21:00	Kvøldseta heima á Garði
21:00	Rundvísing hjá Andriasi í Vágsbotni
21:00	Rundvísing í Listasavninum
21:00	Rundvísing í Skansapakkhúsinum, móttøkuhøll løgmans
21:30	Gríma: Dario Fo sýning. Rúna, Ronny og Sámal undirhalda.
21:30	Oddfríður Rasmussen, Carl Johan Jensen og Jóanes Nielsen lesa yrkingar í SMS
21:30	Spákingartúrur á Reyni og Tinganesi við ferðaleiðara. Byrjað verður í túninum á Tinganesi. Vitjað verður í Havnar kirkju
22:00	Kapping á Torginum í SMS. Vinn eitt sett av mann- ella kvinnufólkaklæðum frá Dress
22:00	Konsert í Bojsensgarði
22.00-03.00	Teknokonsert við "Side Effect" og diskotek fyri ung
22:30	Yrkjarakvøld í Pætursastovu. Oddfríður Rasmussen, Carl Johan Jensen og Jóanes Nielsen
23:00	Clickhaze hevur konsert í Gl. Kommunuskúlagarðinum
23:00	Føroyskur dansur í Sjónleikarhúsinum

gult21 cyan21 magenta21 svart21

Nýskapandi mentanarkvøld

Í dag, fríggjadagin, verður stórt mentanarkvøld í høvuðsstaðnum. Nógv mentunarlig tiltøk vera á skránni, og handlarnir fara at hava opið til langt út á kvøldið

MENTANARKVØLD

Stefan í Skorini

Tiltakið verður sett á Vaglinum, har Gunnar Hoydal heldur røðu

Mynd: Álvur Haraldsen

Ingigerð á Trøðni er leiðari á Kunningarstovuni, og hon hevur verið við til at samskipa tiltakið, sum fyri fyrstu ferð er fyriskipað í Havn. Eitt líknandi tiltak hevur verið í Klaksvík, og tað eydnaðist væl.

– Orsakað av verkfallinum hevur verið eitt sindur av óvissu um tiltakið, og tí hava vit verið eitt sindur seinkað, men nú er alt fallið uppá pláss, sigur Ingigerð um fyrireikingarnar.

Tað var felagið Tórshavn, ið heitti á hana um at samskipa tiltakið. Handlarnir í miðbýnum komu við hugskotinum um at skipa fyri einum slíkum tiltaki, har fleiri mentunarlig tiltøk eru, og handlarnir hava leingi opið. Tað er felagið Tórshavn, sum varð sett á stovn í 1984, ið stendur aftanfyri Kunningarstovuna.

– Ein nevnd varð sett, sum var úti og spurdi handlar og fólk um tey vildu vera við, og hvat tey kundu hugsa sær at gera. So skal eg syrgja fyri, at tey neyðugu loyvini eru í lagi, og at alt praktiskt hongur saman, sum tað skal, sigur Ingigerð á Trøðni.

Sum dømi kann nevnast, at Fornminnissavnið boðaði frá, at tað vildi vera. Síðani avgerð savnið sjálvt, hvat skal fara fram hetta kvøldið.

Nógv áhugaverd tiltøk

Endamálið hjá Felagnum Tórshavn og við hesum tiltakinum er at gera býin áhugaverdan hjá fólkinum, ið búleikast her, og hjá vitjandi. Tað er eisini eydnast við Mentanarkvøldinum.

Byrjað verður fríggjadagin. Fyri at alt skal vera gjørt á rættan formellan hátt, so verður ein setan á Vaglinum, har Gunnar Hoydal fer at flyta fram røðu. Eisini verður tónleikur á skránni við setanina. Jassarnir fara at spæla umframt at barnakórið hjá Tórshavnar Musikkskúla og Havnar Hornorkestur syngja og spæla.

Fleiri tiltøk vera fyri børn klokkan 15. Barnagarðurin á Argjum fer at syngja á torginum í SMS, meðan børn kunnu fáa andlitsmáling í Sjónleikarhúsinum.

Fleiri ógvuliga forvitnislig tiltøk vera á skránni í býnum í kvøld. Millum annað fer Fornminnissavnið at flota tríggjar bátar uppi í Hoyvík. Síðani verður róð til Havnar, har tiltakið verður sett, og róð verður aftur til Hoyvíkar.

Mótaframsýningar fara eisini at seta sín dám á. Klokkan 18 verður mótaframsýning í Dr. Jakobsensgøtu við Keypssamtøkuna, har nakrir handlar har um leiðir hava skipað fyri framsýningini.

Eisini niðri í Vágsbotni verður mótaframsýning. Hon byrjar klokkan 20, har nýggjasti mótin verður sýndur fram fyri áhugaðum.

Handlarnir, sum upprunaliga eiga hugskotið til tiltakið, fara at hava leingi opið. Handlarnir í miðbýnum hava opið til klokkan 23, meðan Handilskjarnin stongir klokkan 22. Í SMS hava tey veruliga brynjað seg út, tí har steingir ikki fyrr enn á midnátt.

Yrkingar

Høvuðsdentur verður lagdur á mentanina. Skipað verður fyri upplestri av yrkingum og frásagnum. Gríma hevur skipað fyri, at Eyðun Johannesen og Johan Norðfoss fara at siga frá gomlu Havnini.

Teir tríggir høvundarnir Jóanes Nielsen, Carl Johan Jensen og Oddfríður Marni Rasmussen fara at lesa yrkingar í fleiri støðum. Klokkan 21.30 lesa teir yrkingar í SMS, og seinni verður yrkjarakvøld í Pætursastovu. Hetta verður klokkan 22.30.

Møguleiki verður harumframt at síggja nakað av gomlu Havnini. Gongutúrur við ferðaleiðara verður av Tinganesi og út á Reyn, har vitjað verður í Havnar Kirkju.

Eigarin av elsta handlinum í Havn fer at vísa fólkið runt har. Andreas í Vágsbotni er elsti handilin, og hann varð bygdur umleið 1760. Fólk fáa høvi at síggja í gamlar handilsbøkur hjá teimum ymsu handilsmonnunum, sum hava havt sítt virki har.

Leingi á veg

Ingigerð á Trøðni sigur, at tey hava arbeitt við hesum tiltakinum síðan apríl mánað, tá tey av álvara fóru undir at fyrireika mentanarkvøldið.

Hon sigur, at síðan tað kom fram í fjølmiðlunum, hava nógv fólk verið á gátt í Kunningarstovuni og spurt seg fyri um skránna og onnur tiltøk.

Einasti vandin við einum slíkum tiltaki er, at tað eru ov nógv mentanarlig tiltøk. Tað kann tí vera ov smábýtt millum tey ymsu tiltøkini, men Ingigerð sigur, at onkustaðni skal byrjast.

– Nú gera vit tað soleiðis, og so vóni eg, at grundarlagið er í lagi. Eg vóni eisini, at vit kunnu gera hetta aftur, sigur samskiparin Ingigerð á Trøðni at enda.

Samskipari av tiltakinum hevur verið Ingigerð á Trøðni, og hon vónar, at tiltakið verður aftur

Gongugøtan verður óivað stúgvandi full av fólk, tá tiltakið fer at bakkastokki

Mynd: Álvur Haraldsen